## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag og hósdagin:**
Fleyr til gul av útsynningi og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av norði og útnyrðingi og um morgunin okkurt ælið, annars turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 13 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Lot til andøvsgul av norði og útnyrðingi og kanska okkurt ælið norðanfyri, annars turt og sólglottar. Hitin millum 10 og 14 stig.

# Telduviðgjørdar myndir úr Hesti og Nólsoy



*Ein av telduviðgjørdu myndunum, sum Carsten Macdonald Arnskov, nú selur*

**- Tú skalt kenna angan av tara og smakka salta sjógvin á varrunum, alt meðan báturin spakuliga vaggar undir tær, rekandi fram við sjóvarmálan, sigur Carsten Macdonald Arnskov í skrivi í sambandi við útgávuna**

ÚTGÁVA
*Turið Kjølbro*

Carsten Macdonald Arnskov, sum hevur arbeitt í Útvarpi Føroya og Sjónvarpi Føroya síðani 1975, selur nú telduviðgjørdar fotomyndir, sum hann og Birgir Enni, skipari á Norðlýsinum, hava tikið. Flestu myndirnar eru tiknar úti í Hesti og Nólsoy.

Myndirnar hava allar verið ígjøgnum umfatandi viðgerð og fleiri viðgerðir í telduni. Fjøll eru flutt, og heilar oyggjar sóktar í havið. Arbeitt verður við litum, ljósi, strukturi, kompositión, og so framvegis. Roynt verður at fáa myndirnar at tala líka nógv til sinnið, sum bert til eygað. Tá tú sært myndirnar, skalt tú helst kunnu merkja sólarhitan og hoyra fuglarnar. Tú skalt kenna angan av tara og smakka salta sjógvin á varrunum, alt meðan báturin spakuliga vaggar undir tær, rekandi fram við sjóvarmálan, sigur Carsten Macdonald Arnskov í skrivi í sambandi við útgávuna.

Tá telduviðgerðin er liðug, verða myndirnar sendar til prentingar á prentsmiðju. Nýtt verður bert serliga tjúkt og gott pappír. Í mesta lagi 10 eintøk av hvørjari mynd verða prentað. Tó kann onkur mynd seinni eisini nýtast sum postkort ella líknandi. Myndirnar, sum eru uml. 26 x 35 cm til støddar, kosta 450,- krónur eintakið.

Umframt hevur Carsten Macdonald Arnskov eisini gjørt myndamappu við seks myndum, ið kallast grótbræðing.

Myndirnar eru eisini at síggja á heimasíðu hansara www.arnskov.com

**Hitalagið kring knøttin**

| | |
|---|---|
| Illulisat | 6 |
| Nuuk | 5 |
| Qaqortoq | 7 |
| Ammassalik | 4 |
| Saint John's | 22 |
| Halifax | 20 |
| Reykjavík | 9 |
| Seyðisfjørður | 11 |
| Tórshavn | 12 |
| Lerwick | 14 |
| Aberdeen | 19 |
| London | 24 |
| Tromsø | 16 |
| Bergen | 17 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | 27 |
| Keypmannah. | 25 |
| Helsinki | 23 |
| Moskva | 21 |
| Berlin | 21 |
| Warzawa | 27 |
| Kiev | 29 |
| Bukarest | 32 |
| Paris | 17 |
| Madrid | 24 |
| Róm | 23 |
| Malorca | 23 |
| Athen | 32 |
| Malta | 28 |
| Tunis | 27 |
| Beijing | 34 |
| New Dehli | 37 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 16 |
| New York | 30 |
| Miami | 31 |
| Los Angeles | 25 |
| Meksikobýur | -- |
| Panama | 30 |
| La Paz | 9 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 19 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 1005 hPa í landnyrðing úr Íslandi fer í landnyrðing. Eitt hátrýst, 1029 hPa vestan fyri Írland fer móti Írlandi.




**Í dag:**
Lágtrýstið vestan fyri Ísland fer spakuliga eystureftir og hátrýstið yvir Írlandi stendur mestsum í stað.

## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 15/07 kl. 06[00]– 16/07 kl. 06[00]. Hitin í gjár: 11,5°
Minsti hiti máldur í juli: 0,4° Mesti hiti máldur í juli: 11,9°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 1,9 mm – mált frá 15/07 kl. 06[00]– 16/07 kl. 06[00]
Avfallið higartil í juli: 12,4 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

17. juli: Fyrra kvarter
24. juli: Full sól
30. juli: Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 17. juli | 00.42 | 13.19 | — | 12.19 | — | 12.34 | 02.42 | 15.19 | 03.42 | 16.19 | 11.34 | — | 10.34 | 23.12 | 00.57 | 13.34 | 01.57 | 14.34 | 00.27 | 13.04 | 01.42 | 14.19 |
| 18. juli | 01.57 | 14.34 | 00.57 | 13.34 | 01.12 | 13.49 | 03.57 | 16.34 | 04.57 | 17.34 | 00.12 | 12.49 | 11.49 | — | 02.12 | 14.49 | 03.12 | 15.49 | 01.42 | 14.19 | 02.57 | 15.34 |
| 19. juli | 03.12 | 15.37 | 02.12 | 14.37 | 02.27 | 14.52 | 05.12 | 17.37 | 06.12 | 18.37 | 01.27 | 13.52 | 00.27 | 12.52 | 03.27 | 15.52 | 04.27 | 16.52 | 02.57 | 15.22 | 04.12 | 16.37 |
| 20. juli | 04.02 | 16.28 | 03.02 | 15.28 | 03.17 | 15.43 | 06.02 | 18.28 | 07.02 | 19.28 | 02.17 | 14.43 | 01.17 | 13.43 | 04.17 | 16.43 | 05.17 | 17.43 | 03.47 | 16.13 | 05.02 | 17.28 |
| 21. juli | 04.54 | 17.21 | 03.54 | 16.21 | 04.09 | 16.36 | 06.54 | 19.21 | 07.54 | 20.21 | 03.09 | 15.36 | 02.09 | 14.36 | 05.09 | 17.36 | 06.09 | 18.36 | 04.39 | 17.06 | 05.54 | 18.21 |

5 707265 100036 >